


## tá vanlukkan hendi á kjarnorkuverkinum í Tjernobyl í 1986?



**Helena Dam á Neystabø:**

– Tá tíðindini um Tjernobyl bórust, hugsaði eg fyrst, at tað var gott, at vit búðu so langt haðani, men so kom tankin skjótt um, hvørt tað fór at raka Føroyar á onkran hátt. Eg var við barn júst tað, og ikki minst tí var eg kløkk av hendingini.

– Eg haldi ikki, at hendingin kann samanberast við, tá ið Kennedy doyði ella 11. september, og kanska var tað tí, at tað hendi ikki í vesturheiminum, og ivaleyst hevur tað eisini havt ávirkan, at tíðindinaflutningurin í Sovjetsamveldinum var so hart stýrdur. Eg minnist, at eitt av føroyskum bløðunum, Fríu Føroyar, ikki gjørdi nakað serligt burturúr, men tosaði um »ávísar óreguligheitir« á kjarnorkuverkinum í Tjernobyl. Tað var ein stór undirmeting av hendingini.

– Eg havi ikki havt nakra avgjørda hugsan um kjarnorku, men eg havi altíð verið skeptisk. Eftir vanlukkuna í Tjernobyl helt eg, at tað fór at verða endin á kjarnorkuni, men tað gjørdist kanska ikki heilt so. Tó hevur kjarnorka ikki verið so nógv útbreidd, sum eg eina tíðina væntaði, at hon fór at verða, og tað komst kanska av Tjernobyl.



**Sonne Smith:**

– Eg var til arbeiðis í Útvarpinum tá. Eg var tíðindamaður, og eg minnist, at vit gjørdu nógv burturúr. Tað minti eitt sindur um álopið á World Trade Center, tí tað byrjaði sum ein lítil søga, men tað bara vaks so hvørt, sum alt kom fram. Fólk vóru kløkk av hendingini, tí avleiðingarnar kundu samanberast við eina kjarnorkubumbu, hóast vanlukkan ikki drap so nógv fólk í fyrstu syftu, sum ein bumba vildi gjørt. Nógv fólk vóru rakt av avleiðingunum, allur gróður í økinum doyði, og eisini djórini har á leið máttu lúta.

– Kjarnorka er tann bíligasta orkan, og hon hon dálkar minst, um verkini eru trygg og einki lekur út. Men tá ið slíkt hendir sum Tjernobyl, so er tað øgiligt. Og eg minnist, at eg stúrdi fyri avleiðingunum av, at Sovjetsamveldið ikki hevði fíggjarliga orku til at halda alla sína útgerð við líka.

– Vit fylgdu væl við støðuni, og vit høvdu tíðindi um Tjernobyl í langa tíð aftan á sjálva vanlukkuna. Enn tann dag í dag hoyra vit um, at fólk úr økinum fáa hjálp frá føroyingum. Tað var ein óhugnalig vanlukka.

# Brúðarmyndir



*Hjartaliga takka vit øllum tykkum sum við gávum, heilsanum og á annan hátt gjørdu hjúnabandsdag okkara 7. august 2004 so hugnaligan og ógloymandi*
***Bára og Jan Guttesen***



*Øllum tykkum, sum við heilsanum, vitjanum og hjálp á ymiskan hátt, vóru við til at gera brúdleypsdag okkara 23. juli 2004 hugnaligan og minnisríkan, takka vit hjartaliga. Tykkum øllum verður eisini ynskt eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár.*
***Gurið og Jónsvein***



*Hjartaliga takka vit øllum sum á ymiskan hátt gleddu okkum á hjúnabandsdegi okkara tann 11.sep. 2004. Eisini ynskja vit øllum eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýttár.*
***Tina & Toni***



*Vit vilja hjartaliga takka øllum tykkum, sum á ymiskan hátt vóru við til at gera hjúnabandsdag okkara 17. juli 04 so góðan og minnisríkan. Eisini vilja vit ynskja tykkum eini Gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýttár.*
***Eyð & Torfinn Viðoy***